# Lýsið har lýsingarnar síggjast

## Leys størv í Føroyum & uttanlands

Fyritøkur og stovnar kunnu nú keypa pláss til starvslýsingar sínar á føroyska portalinum - www.portal.fo og í blaðnum Sosialinum

Føroyski Portalurin, ið er nýggja navnið fyri Olivant.fo hýsir starvslýsingum hjá fyritøkum og stovnum, sum hava áhuga í, at starvslýsingar teirra skulu røkka enn fleiri lesarum. Vanliga vitja upp í 10.000 brúkarar www.portal.fo hvønn dag.







Lýsingarprísur pr. starvslýsing, galdandi frá at lýsingin er løgd út á føroyska Portalin:

| | |
|---|---|
| 1 viku | kr. 1.000,- |
| 2 vikur | kr. 1.500,- |
| til freistin er úti | kr. 2.000,- |

Tekstur (word-fílur) og møguliga búmerki skal sendast viðheft til teldupostadressuna: lysing@sosialurin.fo

Eru spurningar og/ella ivamál, eru tit altíð vælkomin at senda teldupost til:

lysing@sosialurin.fo
ella ring til
Finnbjørg ella Anju
Sosialurin 311820



# Verkfrøðingur

**til P/F Fjarhitafelagið**

Í samband við menning av tekniska førleika felagsins, verður søkt eftir verkfrøðingi til P/F Fjarhitafelagið.
Starvið verður skipað við beinleiðis tilvísing til stjóra felagsins.

**Arbeiðsuppgávur**
Umframt vanligar rakstraruppgávur, fevnir starvið um:
- planlegging av útbyggingum og viðlíkahaldi
- samskifti við ráðgevarar
- umsjón við rakstri
- kundatænasta

**Førleiki**
- útbúgving sum maskinverkfrøðingur, ella tilsvarandi útbúgving
- góðan kunnaleika til EDV
- góð samstarvsevni

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarandi felag.

Umsókn verður at senda til P/F Fjarhitafelgið, postboks 3215, 110 Tórshavn, att.: Jóannes Hansen.

***P/F FJARHITAFELAGIÐ***
Brekkutún 1 – Hoyvík
Telefon 319559

# Fólk søkist

Vit sóknast eftir fólki til arbeiði í gólvhandli, at byrja beinanvegin.
Royndir innan øki, eru ein fyrimunur.

Skrivlig umsókn, merkt "Umsókn", verður at senda til:

**Profa Farvur**
**Staravegur 5 · Boks 3137 · Tel 31 92 20**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Kia Pride
**Árg.:** 2000
**Km.:** 36.000

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Bjartur Brekkstein, sýnsmaður
e-mail: bjb@trygging.fo
Beinl. tlf.: 345771
Fax: 345607

at hitta millum kl. 08.00 – 10.00

# P/f Sveisingahandilin

## søknast starvsfólk

**Vit søknast eftir einum fólki til vørukoyring og goymsluna.**

Arbeiðið umfatar alla koyring av vøru, so sum koyring út til kundar, avheinta vøru á bryggjuni, gera vøru klára at senda.

Inni á goymsluni hevur tú ábyrgdina av at fáa vøruna til hóldar, halda øki og bilarnar.

Fyrimunur er at tú hevur stóra koyrikorti.

Hevur tú spurningar hesum viðvíkjandi ring 311909 Bárður Simonsen.

Umsóknir til starvið skulu sendast til:

**P/F Sveisingahandilin**
Boks 18 • FO-110 Tórshavn
Att.: Bárður Simonsen

# KUNNGERÐ

**Frá útskiftingarnevndini fyri Bíggjar bygd**

Næsti útskiftingarfundur verður í skúlanum í Bø týsdagin 4. juni 2002 kl. 10.30.

Metingin av kommunalu ognartøkuni verður á staðnum kl. 9.15.

Á útskiftingarfundinum verða metingar av kommunalu ognartøkuni og endaligur útskiftingarplanur fyri útskiftingina framløgd.

Útskiftingin verður endað og latin til ákæru.

Allir eigarar verða hervið boðaðir at møta.

**MATRIKULSTOVAN**
N. v.
Øssur A. Midjord
form.

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** BMW 318 TDS
**Árg.:** 1995
**Km:** 83.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Bjartur Brekkstein, sýnsmaður
tlf. 34 57 71
fax nr. 34 56 07
e-mail: bjb@trygging.fo

At hitta mánadag-hósdag millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00.

# Lærugreinaráðgevar

**Starvið**
Í Mentamálastýrinum/Landsmiðstøðini eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2002.

Ráðgevingin fatar um lærugreinirnar **týskt, danskt, støddfrøði og alis-/evnafrøði**. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum hópi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir.

Samanlagt eru 15 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 1/2 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 6 til 12 lønartímum um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta KT í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tey, ið sett verða, skulu undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. mai 2002.

Gjøllari upplýsingar fáast frá stjóranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Mentamálastýrið og Landsmiðstøðin**

***Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Landsmiðstøðin*** *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingaramboð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálastýrinum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri fakligum, námsfrøðiligum skeiðum fyri lærarum og skúlamyndugleikum.*

# Handilslærlingur

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vit søkja eftir fólki til handil okkara, arbeiðsuppgávurnar koma at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring, bílegging av vørum og seinni egin ábyrgd av starvsøki, umframt aðrar uppgávur.

Er spurningur ella ivamál ringið til okkara á tlf. 315600

Umsókn ynskist til 1. juni 2002

*Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co. varð stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna, og útgerð til fiski- alivinnuna, skip og bátar*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Postboks 1200 · 110 Tórshavn